## Nógvar "sprekkur" ov smáar

Valdagurin er ein langur dagur í valhølunum hjá teimum, sum skulu syrgja fyri, at alt gongur regluliga fyri seg. Á nógvum valstøðum møttu valnevndarumboðini upp longu klokkan 08, tí brævatkvøðurnar skuldu kekkast og fáast upp á pláss. Klokkan 10 lótu valhølini upp, og nógvastaðni hevur ikki verið liðugt at telja upp fyrr enn ein til tveir tímar eftir, at valhølini lótu aftur klokkan 20. Soleiðis er hetta ein langur dagur. Men hetta er samstundis eisini ein hugnaligur dagur, har valnevndarumboð hitta nógv fólk, sum leita sær á valstaðið. Ein trupulleiki á summum valstøðum var, at sprekkan í atkvøðukassanum var ov stutt – og soleiðis eisini ov trong - til teir breiðu valseðlarnar, nú valevnini vóru so mong, og hvør flokkur stóð í tveimum røðum niðureftir. Sosialurin hevur frætt, at á summum valstøðum var neyðugt at fara eftir sagini og saga sprekkuna niður í valkassan breiðari. Hetta var nakað, sum valnevndarumboð í summum førum ikki høvdu hugsað um, og tí varð ikki funnið út av hesum, fyrr enn fyrstu veljararnir vóru komnir inn á gólvið. Sum skilst, tarnaði hetta kortini ikki tað stóra.



# Fiskimálaráðnum



*- Tað kann ikki vera soleiðis, at vit, sum altíð eru til dystin fús og eru klárir at traðka til og hjálpa, tá dálking hóttir umhvørvið, skulu stúra fyri, at vit møguliga ikki fáa okkara part endurgoldnan, sigur Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður*

*Mynd: Vilmund Jacobsen*

MRCC var sera gott undir hesum arbeiði – heilt frá byrjan til endan.

- Onkrir smávegis samskiftistrupulleikar vóru, men sum heild gekk samstarvið útmerkað, leggur Sunleiv Højgaard dent á.

### Nógv atlit

Tað er ikki bara sum at siga tað at fáast við fyribyrging av dálking og upptøku av olju.

- Vit høvdu eitt ávíst tal av oljusperrum úti, og aðrar lógu klárar, um fleiri "álop" komu.

Hann vísir á, at Skálafjarðar Sløkkilið eisini hevði neyvt samstarv við Heilsufrøðiligu Starvsstovuna um, hvussu fram skuldi farast.

- Ymisku økini eru býtt upp, og tað er ikki allastaðni, tú bara kanst flyta oljusperringar úr einum øki í annað. Ásetingar um smittuvanda gera, at neyðugt er at vaska sperrur og aðra útgerð, sum nýtt verður til fyribyrging og upptøku, áðrenn útgerðin kann flytast millum ávís øki.

Sunleiv sigur, at Skálafjarðar Sløkkilið tí eisini noyddist at syrgja fyri, at útgerðin bleiv vaskað og sóttreinsað fyri smittu, og eisini varð neyðugt at koyra útgerð, sum brúkt hevur verið í einum øki, í afturlatnum bingjum millum økini.



### Tilbúgving kostar

Brunaumsjónarmaðurin hjá kommununum við Skálafjørðin vísir á, at tað almenna noyðist at ásanna, at tilbúgving eisini kostar pening.

- Tað kann ikki vera soleiðis, at vit, sum altíð eru til dystin fús og eru klárir at traðka til og hjálpa, tá dálking hóttir umhvørvið, skulu stúra fyri, at vit møguliga ikki fáa okkara part endurgoldnan.

Hann heldur, at um stríð verður um slík mál, er ivasamt, um Føroyar fara at hava nakra tilbúgving, tá ið ein slík vanlukkan hendir aftur.

- Vit vænta sjálvsagt at fáa peningin, sum vit eiga til góðar, men samstundis mugu vit ásanna, at hetta hevur tikið langa tíð, sigur brunaumsjónarmaður.

### Olshana liggur

Sunleiv Højgaard sigur, at honum kunnugt kemur eingin oljan av týdningi upp úr Olshanu nú.

- Skipið liggur væl og djúpt, har tað liggur í móru. Hetta er deyðavatn, og eg trúgvi ikki, at stórur vandi í løtuni er fyri, at olja fer at leka úr skipinum.

Hann heldur, at myndugleikarnir nú hava stundir til at meta um støðuna og taka avgerðir um, hvat skal henda við skipinum.

- Tøknin við upptøku av olju broytist og mennist alla tíðina, og eg trúgvi, at nú skipið liggur, sum tað liggur, hava myndugleikarnir góðar stundir at meta um viðurskiftini og taka røttu avgerðirnar, sigur Sunleiv Højgaard.

## Sverri sakk í Oyrunum

**Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður, sigur, at tá ið boð verða send eftir sløkkiliðnum undir slíkum umstøðum, kenna teir tað sum sína skyldu at taka um endan**

SOKKIN

*Vilmund Jacobsen*
*vilmund@sosialurin.fo*

30 tonsarin Sverri hevur leingi ligið við bryggju í deksbátahavnini í Oyrunum á Toftum. Báturin, ið er skrásettur sum stuttleikabátur, hevur einki fiskiloyvi, men sum skilst hevur ætlanin verið at rikið gágguveiði við honum.

Í vikuskiftinum lá báturin tungur í sjónum, og um 15-tíðina sunnudagin sendi útgerðarmaðurin, sum er Sørin Svenning Danielsen, boð eftir Skálafjarðar Sløkkiliði, sum byrjaði at pumpa sjógv upp úr Sverra.

Tá ið sløkkiliðið hevði fingið nakað av sjógvi upp úr bátinum, legði hann seg í bakborð, og eina løtu sunnukvøldið helt Sunleiv Højgaard, brunaumsjónarmaður, at ikki var ráðiligt at fara umborð og leggja pumpurnar betur, tí vandi var fyri, at báturin kundi koppa.

Skjótt funnu menn kortini út av, hvussu teir best kundu bera seg at, og eftir at pumpurnar vóru lagdar betri, minkaði sjógvurin skjótt í Sverra.

Sunleif Højgaard sigur, at klokkan var farin nakað av 20, tá ið báturin fleyt aftur.

- Tá ið vit fingu pumpurnar upp á pláss, og soleiðis kundu seta meira ferð á, gekk skjótt at fáa sjógvin úr bátinum. Samstundis, sum vit pumpaðu, noyddust vit eisini at tetta dekkið, tí sjógvur lak niður, sigur hann.

Sørin Svenning Danielsen, útgerðarmaður hjá Sverra, var eisini á bryggjuni, tá ið vit vóru fram við sunnukvøldið.

Útgerðarmaðurin segði seg ikki vera greiðan yvir, hví báturin, sum ikki hevur likið nakað av týdningi, var sokkin eftir lutfalsliga so stuttari tíð.

- Vit fara at royna at finna út av, hvat er hent, tá ið hann er komin uppaftur at flóta, segði hann.

Sverri er bygdur í Holbæk í Danmark í 1947 úr eik og bók. Hann er 15,39 metrar langur, 4,88 metrar breiður og er merktur 32,47 brt.

Maskinan er ein grenaa diesel (1986), 170 hk.

Sunleiv Højgaard sigur, at tá ið boð verða send eftir sløkkiliðnum undir slíkum umstøðum, kenna teir tað sum sína skyldu at taka um endan.

- Og tá kann tað sum so vera líka mikið, um ein bátur er tryggjaður ella ikki, leggur hann aftrat.

Sum skilst, var Sverri ikki tryggjaður, nú hann sakk við bryggjuna.



*Um gott 20-tíðina í gjárkvøldið – ella ein lítlan tíma eftir, at hendan myndin er tikin – fleyt Sverri aftur Vilmund Jacobsen*